| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>25. februar 2010 | Blað nr.:<br>**8397** |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **25. februar 2010** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 15/10-35/10**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Maria H. Olsen
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Jákup Egholm Hansen
Jóan Petur Hentze

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**25/10** **2010-0177**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 25. februar 2010:** Tikið til eftirtektar.

**26/10** **2007-3478**

**Umsókn frá Verkfrøðingastovuni vegna P/F Poul Michelsen, P/F Ognarfelagið SK og P/F Postverk Føroya um broyting av almennu byggisamtyktini fyri B5-vinnuøki við Hoyvíksvegin og samsvarandi Broyting fyri Serstøku byggisamtykt nr. 7.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ætlanin er at víðka B5-vinnuøki uml 27 m eystureftir, soleiðis at partar av 1316 a,1316 e (eigari P/F Poul Michelsen) og 1317 a (eigari P/F Ognarfelagið SK-P/F Postverk Føroya ) verða broyttir frá A1-øki til B5-øki í almennu byggisamtyktini og samsvarandi frá A2-øki til D-øki í serstøku byggisamtykt nr. 7.

Markið ímillum bústaðar- og vinnuøki hevur í dag eitt lítið knekk upp á uml. 27 m við ognina hjá P/F Postverk Føroya. Hetta kom tá ið byggisamtyktin var broytt í 1999, mál nr. 1999-1241 og 1999-1242.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og broyta almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtykt nr. 7 sambært kortskjali dagf. 31. jan 2008.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. februar 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at matrikulmarkini verða umskipað tilsvarandi.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
1. juli var freistin at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum til ætlaðu broytingina av byggisamtyktini við Óðinshædd.

Tvey mótmæli eru móttikin, eitt frá íbúgvunum á Óðinshædd og eitt frá eigarafelagnum Norðara Stoffalág.

Bæði mótmælini vísa á, at broytingin kemur at ávirka bústaðarøkið við øktum larmi og at við hesi broytingini kemur vinnuøkið at verða bæði omanfyri og niðanfyri teirra bústaðir.

Eisini vísa íbúgvarnir við Óðinshædd á, at kommunan lýsir ov illa tá ið ætlaðar broytingar verða kunngjørdar. Tey meina at ein greið orðing saman við einum týðiligum korti skal verða við kunngerðini.

Til hesi mótmæli er at siga, at tann parturin av vinnuøkinum, sum liggur nærmast teirra bústaði (grundøki hjá Postverk Føroya) ikki verður broytt og tí verður neyvan bygt meira á hesum økinum orsakað av ætlaðu broytingini. Á ognunum hjá P/F Poul Michelsen og Gummibátatænastuni verður møguleiki fyri útbyggingum, men hesar ognir liggja meira enn 100 m frá bústaðar økinum. Harafturat verður møguleiki fyri einum eitt sindur størri bygningi á ognini 1317c hjá P/F Ognarfelagið SK, sum liggur óbygt í løtuni.

Viðmerkingarnar um at ætlaðar byggisamtyktarbroytingar verða ov illa lýstar, hava møguliga nakað at gera við, at húsaeigararnir við Óðinshædd hava lagt sak ímóti kommununi um eina broyting í byggisamtyktini um B10 vinnuøki – niðanfyri vegin Óðinshædd – sum var gjørd í 1999.

Kunngerðirnar verða gjørdar sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir við eini stuttari frágreiðing um hvat ætlaða broytingin snýr seg um, hvørjar ognir ætlanin fevnir um, hvar og nær tilfar liggur frammi, ið lýsir broytingarætlanina nærri og nær seinasta freist at mótmæla er.

Eisini hevur Verkfrøðingastovan boðað frá í einum telduposti at kortið ið hevur ligið frammi ikki samsvarar heilt við teirra umsókn (sí kort) og at í lýsingini av broytingini stóð “uml. 25. m eystureftir” ímeðan umsóknin var um uml. 27 m.

Hetta snýr seg um eina minni justering av markinum ímillum umráðispartarnar og kann helst gerast uttan at ætlanin verður løgd fram av nýggjum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast um ætlaðu broytingina vísandi til, at henda ikki fer at virka til økta ferðslu ella munandi økt óljóð í bústaðarøkjunum Óðinshædd og Norðara Stoffalág.

Eisini mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til, at ætlaða broytingin verður justerað eftir umsóknini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. august 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Í sambandi við viðgerðina av broytingini av byggisamtyktini, sum Verkfrøðingastovan søkti um vegna P/F Poul Michelsen, P/F Ognarfelagið SK og P/F Postverk Føroya, var eitt minni ósamsvar ímillum umsóknina og kortið, sum broytingin var viðgjørd eftir. Hetta gjørdi umsøkjarin skrivliga vart við. Býráðið samtykti, at senda broytingina til endaliga góðkenning hjá Innlendismálaráðnum, justerað eftir umsóknini.

Innlendismálaráðið góðkendi ikki justeraðu broytingina, men bert eftir kortskjølunum, sum umsóknin var viðgjørd eftir og høvdu ligið frammi til almenna kunning.

Nú er so nýggj áheitan komin frá umsøkjarunum, um at fáa broytt byggisamtyktina eftir uppruna umsóknini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin verður broytt sambært rættaða kortskjalinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**27/10** **<u>2008-4167</u>**

**<u>Uppskot til útstykking undir Gráasteini - privat útstykking - broyting av byggisamtykt</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kommunan hevur móttikið fleiri umsóknir um loyvi til at sundurbýta ognir undir Gráasteini. Hesar útstykkingarætlanir liggja allar við síðuna av hvørja aðrari, og eru hesar ætlanir gjørdar í hvør sínum lagi uttan at hugsað hevur verið um eina heildarætlan fyri økið. Mett verður at best hevði verið um ein felags útstykking

var gjørd fyri allar niðanfyri nevndu matriklar, soleiðis at økið var skipað sum ein eind við felags vegum, leiðingum, fríøkum v.m.

Umsitingin hevur vegna byggi- og býarskiparanevndina gjørt uppskot til eina felags útstykkingarætlan fyri ognirnar. Víst verður í hesum sambandi til nevndar-viðgerð í málunum nr.:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr.1116a | Elly Nielsen. | 2006-3219 |
| Matr.nr.1118b | Finnur J.Rubeksen. | 01/00759 |
| Matr.nr.1119 | Sp/f K.J.Contractors. | 2005-2003 |
| Matr.nr.1120a. | Hendrik Rubeksen. | 2005-1683 |

Skotið verður upp, at gera eina útstykkingarætlan fyri økið sum heild við felags vegum, leiðingum, fríøkum v.m. (sí skjal nr.2008-4167/1).
Uppskotið er sent til teknisku deild til viðmerkingar.(sí skjal nr.2008-4167/5).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at góðkenna uppskotið til útstykking undir Gráasteini og at senda uppskotið til hoyringar hjá omanfyri nevndu eigarum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. oktober 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsiting hevur móttikið viðmerkingar frá eigarunum av omanfyri nevndu matriklum. Eisini hevur fundur verið partana millum har eigararnir hava greitt frá teirra støðu.

Serliga varð mótstøða ímóti at avmarka talið av grundstykkum. Eisini varð ónøgd við at eingin stykkir til tvíhús vóru og at tinglýsta atgongdini frá parkeringsøkinum framman fyri íbúðarblokkarnar varð avmarkað.

Umsitingin hevur gjørt broytingaruppskot sum m.a.fevnir um:

- Grundstykkir til dupulthús verða loyvd fram við Landavegnum.
- Avmarkað atgongd frá p-plássinum framman fyri íbúðarblokkarnar.
- Pláss fyri felagsparkering.
- Stórt felags fríøki á matr.1119 og eitt minni á matr.1118b
- Felags atkomuvegur millum matr.nr. 1116a hjá Elly Nielsen. og matr.nr.1118b hjá Finnur J. Rubeksen.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til útstykking undir Gráasteini og at senda uppskotið til hoyringar hjá teknisku deild og eigarunum av ognunum, sum útstykkingin umfatar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mars 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur á fundi 16.04.2009 lagt uppskot 2008-4167/21 fyri eigararnar. Frammøttu eigararnir greiddu frá teirra støðu. Onkur av eigarunum heldur fast um sína upprunaligu umsókn og ynskir ikki samlaðu og skipaðu útstykkingina fyri økið, sum umsitingin hevur mælt til, og sum byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt 30. mars 2009. Aðrir umsøkjarar vilja sleppa at fáa fleiri grundstykkir burturúr sínum traðum. Og onkur umsøkjari hevur eisini víst á, at tey ynskja at fáa atgongd til nøkur stykkir frá parkeringsplássinum við stóru íbúðabyggingina á matr. nr. 1119b, 1119c, 1119d, 1119e og 1119f. Uppskotið hevur eisini verið til ummælis í tekniska deild.

Fyriliggjandi tekur atlit at ásetingunum í almennu byggisamtyktini um felagsøkir. Frammanundan er partur av øllum hesum traðum seldur til stóru íbúðabyggingina á matr. nr. 1119b, 1119c, 1119d, 1119e og 1119f, og er bústaðatættleikin í økinum stórur, meðan ov lítið er avlagt til felagsøkir fyri býlingin. Tí verður mælt til at halda fast um neyðug øki til felagsøkir, og tað verður mælt frá at økja tættleikan meira, við at loyva tættari bygging enn í fyriliggjandi uppskotið hjá umsitingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

1. at gerast skal eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr.nr.1116a, matr.nr.1118b, matr.nr.1119 og matr.nr.1120a grundað á skipanaruppskot frá umsitingin 2008-4167/21, at leggja fyri nevndina til endaliga góðkenning.
2. at halda fast um neyðug økið til felagsøkir sambært skipanaruppskot frá umsitingin 2008-4167/21
3. at loyvi verður ikki givið til at økja tættleikan meira enn sambært skipanaruppskot frá umsitingin 2008-4167/21
4. at atkoma til grundstykkir á matr. nr. 1116a, 1118a, 119a og 1120a verður ikki loyvd frá parkeringsøkinum hjá stóru íbúðabyggingina á matr. nr. 1119b, 1119c, 1119d, 1119e og 1119f

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið undir Gráasteini. Uppskotið er grundað á skipanaruppskotið, 2008-4176/21 og samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 11.05.2009.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðkennir uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið undir Gráasteini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 25. juni 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla ella koma við broytingaruppskotum til serstøku byggisamtyktina var 24. august, tá hevði TK móttikið 4 mótmæli/broytingaruppskot.

Eitt frá Elly og Kára Nielsen, eigara av matr. nr. 1116a, eitt frá Óla Jákup Kristoffersen, adv. vegna Hendrik Rubeksen, eigara av matr. nr. 1120a, eitt frá Finnur Rubeksen, eigara av matr. nr. 1118a og b og eitt frá Sofus Hansen vegna plan- og rakstrardeildina hjá TK.

Umsitingin hevur viðgjørt mótmælini/broytingaruppskotini í serstøkum skjali, j.nr. 2008-4167/36

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast um ætlaðu serstøku byggisamtyktina fyri økið undir Gráasteini við hesum broytingum/viðmerkingum:

a. viðv. kæruni frá Elly og Kára Nielsen, eigarar av matr. nr. 1116a, verður mælt til partvíst at ganga kæruni á møti, og at justera byggisamtyktina soleiðis, at niðara fríøki á matr. nr. 1116a verður broytt til eitt grundøki til stakhús.

b. viðv. kæruni frá Óla Jákup Kristoffersen, adv, vegna Hendrik Rubeksen, eigara av matr. nr. 1120a, verður mælt til ikki at ganga kæruni á møti

c. viðv. broytingaruppskotinum/kæruni frá Finnur Rubeksen, eigara av matr. nr. 1118 a og b, verður mælt til ikki at ganga kæruni á møti

d. viðv. broytingaruppskotinum/kæruni frá J. Sofus Hansen, vegna plan- og rakstrardeildina hjá Tórshavnar kommunu, verður mælt til at gøtan fram við vesturmarkinum á matr. nr. 1120a verður breiðkað frá 3 til 4 m og annars halda fast við ætlaðu serstøku byggisamtyktina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 5. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Skriv er komið frá Christian Andreassen, advokati sum umboðar.eigaranum av matr.nr. 1119.

Av tí at ein av ognunum hevur skift eigara, eru skrivini sum Tórshavnar kommuna hevur sent út ikki send til nýggja eigaran, og hevur hesin tí ikki havt

somu møguleikar sum hinir fyri at gera sínar viðmerkingar í sambandi við arbeiðið at gera nýggja serstaka byggisamtykt.

Hóast uppskotið hevur ligið alment frammi, verður tað løgfrøðiliga mett, at rættast er at geva honum møguleiga at koma við viðmerkingum og eftirfylgjandi viðgera málið í byggi- og býarskipanarnevndini áðrenn málið verður latið býráðnum til endaliga viðgerð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
- Málið er sent Sp/f Íbúðir undir Gráasteini til viðmerkingar og umsitingin hevur eisini havt kunnandi fund við teir.

Skriv er komið frá Christian Andreasen, vegna Sp/f Íbúðir undir Gráasteini, dagfest 02.02.2010, j.nr. 2008-4167/xx.

Christian Andreasen skrivar, at teir ikki kunnu góðtaka fyriliggjandi uppskot til byggisamtykt viðvíkjandi teimum ásetingum, sum eru galdandi fyri ognina hjá Sp/f Íbúðir undir Gráasteini, matr. nr. 1119a. Teir meta ikki at kommunan hevur nakra sakliga orsøk til at leggja umleið 1/3 av økinum út til felagsøki, tá felagsøkini á hinum ognunum eru munandi minni. Teir skjóta upp at gera eina semju, har grundøkini oman fyri vegin heilt ella partvís kunnu nýtast til dupulthús. Um kommunan heldur fast við ætlanina, verður kært sambært galdandi reglum.

Umsitingin hevur gjørt ummæli av mótmælum/broytingaruppskotum, sum verður lagt fram á fundinum, j.nr. 2008-4167/xx

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast um ætlaðu serstøku byggisamtyktina fyri økið undir Gráasteini við tí grundgeving, at í uppskotinum eru atlit tikin til at største felagsøkið liggur inni á matr. nr. 1119a, við tað at parkeringspláss, vendipláss o.a. eru løgd á hinar matriklarnar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. februar 2010:** Atkvøtt um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jákup Símun Simonsen

**28/10** **2006-3439**

**Umsókn um keyp av grundstykki til Frískúlan í Tórshavn**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Í skrivi frá 5. august 2008 søkir skúlastýrið fyri Frítíðarskúlan í Tórshavn um at fáa eitt grundstykki til keyps frá kommununi til at byggja nýggjan skúlabygning á.

Longu tá ætlanirnar um Frítíðarskúlan vóru um at koma undir land í 2006, var stýrinum greitt, at neyðugt fór at verða at byggja ein skúla onkustaðni í Tórshavnar kommunu. Tá Frískúlin í 2007 keypti og flutti í fyrrverandi barnagarðin á Velbastað, var tað stýrinum greitt, at hendan loysnin bert var hóskandi í tvey ár. Neyðugt fór tí at verða hjá Frískúlanum at byggja nýggjan skúlabygning til skúlaárið 2009/2010 og tískil sum skjótast at fáa sær hóskandi stykki til vega. Samstundis hevur eisini alla tíðina verið greitt, at frískúlin sum ein "non-profit" stovnur og sum skúli fyri vanligar familjur í Tórshavnar kommunu ikki kundi kappast við ríkmenn um at keypa privatar ognir.

Ynski skúlans eru, at grundstykkið skal liggja høgliga við atliti til almennu bussferðsluna og við ikki alt ov stórari frástøðu til ymisk tilboð, eitt nú írróttaøki, mentanarstovnar og onnur pláss, sum eru viðkomandi fyri næmingarnar, frálæruna og truvnaðin. Ein av høvuðstættum skúlans er eisini at knýta so stóran part av frálæruni og virksemunum, sum tilber, at náttúruni. Tí kunnu ynski skúlans samanfatast soleiðis, at best egnaða grundstykki er nærhendis náttúruni, tó í nánd av rutunetinum hjá bussleiðini og ikki ov langt frá ymiskum almennum tilboðum.

Skúlabygningurin er ætlaður at vera um 1000 fermetrar við trimum-fýra skúlastovum, felagshøli, matarhøll og góðum umstøðum til starvsfólkið. Harafturat skulu verða rúm til toilett, reingerð v.m. Sambært stýrinum eigur grundstykkið, grunda á støddina á bygninginum, at vera einar 4.500-5.000 fermetrar, soleiðis at rúm eisini verður til spælipláss, leikvøll og annað neyðugt og hóskandi útiumhvørvi. Skúlin verður so vítt gjørligt bygdur eftir grønum prinsippum, har varandi orka í mest møguligan mun verður nýtt.

Skúlastýrið hevur víst á nøkur øki, sum umrødd vóru á fundi 27. juni 2008 og søkja um at sleppa at keypa trøð ovast við Villingardalsvegin, millum Villingardalsvegin og Sundsvegin.

Ber hetta ikki til søkja tey í øðrum og triðja lagi um at sleppa at keypa trøð norðan fyri gamla skúlan á Hvítanesi ella trøð vestan fyri vinnuøki í Havnadali, oman móti Sandá.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin fyri løgdeildini mæla fíggjarnevndini at senda umsóknina til ummælis í byggi- og býarskipanar- og teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanar- og teknisku nevnd.

**361. Øki til frískúlan (Leiðslufundur 04.11.08:**

Spurningurin um at lata øki til frískúlan varð umrøddur. Trý uppskot vóru frammi. Trøð í Villingardali, trøð í Havnardali og trøð á Hvítanesi. Avgjørt varð at biðja umsitingina lýsa fyrimunir og vansar á ymsu økjunum, og somuleiðis ásetingar og framtíðarætlanir fyri økini smb. m.a. heildarætlanini.

**Ískoyti:**
21. november 2008, ymist um fyrimunir og vansar frá Lendisdeildini:

| staður | byggisamtyktarøki | matr.nr. | vídd | eigari | atkoma |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvítanes, Norðanvert skúlan | E-øki til almenn endamál skúla v.m. | 117 Hoyvíkar bygd | uml. 3030 m² harav 1500 m² | TK | Sera vánalig Sera smalir Vegir Graslíkisvøll |
| Havnardalur Akranesgøta Sandá | 4. grundumráði Við Sandá Verndarlinja máti ánni | 1083a Tórshavn | 25770 m² traðir | TK TK | Vánalig Ígjøgnum Ídnaðarøkið B3 |
| Villingadalur, Villingadalsv. /Sundsvegur | A3 og 4. grundumráði Verndarlinja við Hoydalsá | 1357a Tórshavn | 12.762 m² | TK | Sundsvegur/ Nýggja Sundsvegnum |

**Villingadalur:**
Ásetingar og framtíðarætlnir /heildarætlan:
1. krevur loyvi samb. lóg um náttúrufriðing og bygging nær við áir > 4 m breidd í botninum
2. økið liggur í A3 bústaðarøki og 4. grundumráði
3. aðrar framtíðarætlanir eru ætlanir um kampingpláss norðanvert ánna

**Fyrimunir:**
Økið liggur frítt fyri við Hoydalsá undir Villingadalsfossi og Húsareyni, nær við alfara veg, buss, kloakk og aðrar veitingarskipanir, í nýútbyggingarøki, góð lívd og gott útsýni.

**Vansar:**

Verandi vánaligu umstøður við fjósi hjá festaranum av Húsagarði, eitt umhvørvisligt ótøki. Atkoma kann skipast eftir nýggja Sundsvegnum, tá Villingadalsvegur verður stongdur av ringvegnum.
Byggisamtyktin A3 loyvir fRískúla, men best hevði verið um byggisamtykarøkið var D3, til almenn endamál og stovnsøki. Økið liggur uml. 135 m hædd.

**Havnardalur.**
Ásetingar og framtíðarætlan/heildarætlan

1. krevur loyvi samb. lóg um náttúrufriðingar, um bygging nær við áir > 4 m breidd í botninum.
2. 4.Grundumráði, er lagt til landbúna, byggisamtykt má broytast til D3
3. Byggilinja er teknað upp fram við Sandá, ikki tinglýst.
4. Ferðslan til og frá skúlanum verður gjøgnum vinnuøki B3
5. Økið liggur sera ábart fyri útsynnings- og vesturættunum.

**Fyrimunir:**
Nærleikin til ánna

**Vansar:**
Byggisamtyktin loyvir bert bygging til landbúna, byggilinja er teknað á kort fram við ánni, atkoman verður ígjøgnum vinnuøki, nærmasti granni er Føroya Bjór, og útsýnið er vánaligt og ikki er veðurgott.

**Hvítanes**.
Ásetingar og framtíðarætlanir
Serstøk byggisamtykt frá 1979 broytt í 1982 er galdandi, økið er lagt av til "almenn endamál"kirkju, skúla, smákomuhús v.m.

**Fyrimunir.**
Ásetingin í byggisamtyktini fyri Hvítanes, at økið kann brúkast til skúla og at økið liggur í góðari lívd.

**Vansar:** Atkoman er sera trupul, og tilkoyringarvegirnir eru ikki góðir til meira ferðslu. Verandi gamli skúli og spæliøki við nýggjum graslíkisvølli, verða ávikavíst brúkt sum útibarnagarður og sum spæliøki hjá hvítanesbørnum. Økisvíddin er avmarkað til 1500 m².

**Ískoyti II**
Vísandi til innanhýsis fund miðjan januar 2009 á byggideildini, har øll trý økini í uppskotinum vóru umrødd, varð avgjørt ikki at taka undir við nøkrum av nevndu økjum, men ístaðin at vísa til øki nr. 33, 35 ella 37 við Karlamagnusssarbreyt, sí hjálagda avrit.
Byggjast kann í fleiri hæddum, økið er nær við høvuðsvegakervi, ítróttar- og frílendi og haga.
Leiðslufundur í dag 27. januar 2009, hevði málið til umrøðu og varð tikið undir við at arbeiða víðari eftir hesum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til svara umsøkjaranum sambært omanfyri nevndu lýsing, at øki nr. 33, 35 ella 37, vestanfyri Karlamagnussarbreyt stendur teimum í boði at ogna sær.

**Sjúrður Olsen var ikki við til hetta málið.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

Jógvan Arge var ikki við til hetta málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2009:** Nevndin samtykti, at umsitingin hevur fund við umsøkjaran um staðsetingina og at málið síðani verður lagt fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti II:**
**13. mars 2009 fundur** hjá teknisku fyrisiting við umsøkjarnar. Avgjørt varð at kanna neyvari tríggjar staðsetingar
1. Økið við og Rólantsgøtu við Dalin Langa, ið er lagt av til stovnsbygging.
2. Á økinum hjá Valbirni Dalsgarð undir Kongavarða.
3. Økið við Klingruna Inni á Gøtu.

**Lendisdeildin**
Lýsing av økjunum í nevnd vórðu:

| Staður | Bygsamtk. | Matr.nr. | Vídd | Eigari | Atkoma | Tekn. install |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rólantsgøta | A3 | Partur av 55-135fe | 4.700 m2 | TK | Sambindingarvegur | allar |
| Undir Kongavarða | A3 | Partur av 37-255 | 4.900 m2 | Sp/f Valbjørn Dalsgarð | Ringvegur | allar |
| Inni á Gøtu | A3 | Partur av 54-138a | 4.200 m2 | TK | Sambindingarvegur | allar |

1. Rólantsgøta liggur við endan av sambindingarvegi á lítlum kneysa við fríum útsýni eystureftir og við frílendiskílan Dalin Langa. Hinumegin dalin er ætlan at byggja íbúðarhús. Økið liggur væl fyri við góðum atkomumøguleikum. Tórshavnar kommuna eigur økið og hevur lagt tað av til dagstovn, og tekning er gjørd. Mett verður at hetta økið er best egnað.

2. Undir Kongavarða, liggur høgt hevur sera gott útsýni, góð lívd fyri vestanættum, men annars ábart og ikki so frítt fyri. Økið liggur við innkoyringina til íbúðarøkið Kongavarði. Her verður nógv ferðsla framvið av íbúgvarum, og næst við er høvuðsvegin út á Hamarin, Glyvursnes og dagstovn og til nýggja skúlan á Argjum. Økið er ikki ogn hjá kommununi.

3. Klingran, liggur dygst við nýggja sambindingarvegin Inni á Gøtu. Økið liggur millum vegin og komandi byggiøkið á heygnum sunnanfyri. Ùtsýnið er gott. Og góð lívd fyri vestanættum. Roknast kann við at har verður nógv ferðsla tá byggingin verður sett í verk. Økið er ogn hjá kommununi.

Samanumtikið verður mett at Rólantsgøta er besta boð. Atkomuvegir og lendisgøtur eru gjørdir, og mesta byggingin í økinum er framd. Haraftrat kemur tað ikki óvart á grannalagið at her verður stovnsvirksemi við til- og frákoyring. Økið ber væl eina estetiska vakra loysn. Útbyggingarmøguleikar eru ikki góðir,

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at vísa á eitt hóskandi stykki.

**Ískoyti:**
Vísandi til, at økið við Rólantsgøtu upprunaliga hevur verið ætlað einum dagstovni, eigur málið um at selja Frískúlanum økið til skúlabygging, at latast Trivnaðarfyrisitingini og avvarðandi faknevnd til ummælis. Hetta tí, at byggi- og býarskipanardeildin ikki hevur aðrar staðsetingar til ein framtíðar dagstovn í økinum at vísa á.

Somuleiðis eigur kommunan at seta inn í sølutreytirnar fyri grundøkið – uttan mun til hvar tað er - at kommunan skal góðkenna byggisnið v.m. fyri at tryggja, at talan er um hóskandi bygging fyri økið og aðra bygging kring skúlan sum heild.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. mai 2009:** Nevndin samtykti at umsitingin tosar við umsøkjaran um møguleikan at leggja skúlan Inni á Gøtu ella á Velbastað.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt hjá byggi- og býarskipanarnevndini 11. mai 2009, hevur umsitingin havt fund við umboð fyri frískúlan um staðseting av nýggjum skúlabygningi til frískúlan Inni á Gøtu.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til staðseting av frískúlanum og nýggjum kirkjugarði fyri Hoyvík (j.nr. 2007-2036), omanfyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

Hendan staðsetingin uppfyllir eisini ynskini hjá umsøkjarunum um nærleika til náttúru, í nánd av rutunetinum hjá bussleiðini og ikki ov langt frá almennum tilboðum.

Ein vansi við hesi ætlan er, at byggisamtyktin fyri hetta øki var broytt til ítróttarøki í sambandi við Stórutjørnverkætlanina. Í serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn, var hetta økið lagt sum ein partur av golfvøllinum.

Umsitingin metir, at almenna byggisamtyktin fyri TK og serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn eiga at verða broyttar soleiðis, at økið kann nýtast til frískúli og aðra bygging, sum kunnu staðsetast her.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at frískúlin fær ávíst grundøki víst á kortskjali, dagf. 3. februar 2010, til keyps sambært vanligum treytum, at byggja skúla á.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum um staðseting og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til, at frískúlin fær ávíst grundøkið, sum er víst á kortskjali í málinum, dagf. 3. februar 2010, til keyps sambært vanligum treytum, at byggja skúla á, herundir við teirri treyt, at byggingin byrjar innan tvey ár.

Tilsøgnin er treytað av, at góðkenning fæst frá Innlendismálaráðnum at selja frískúlanum grundøkið.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**29/10** **<u>2003-0989</u>**

**<u>Skriv frá Skipafelagnum Føroyar, um at fáa keypsoptión upp á pakkhúsið, sum teir leiga frá Tórshavnar havn á Eystaru bryggju</u>**

Síðani Tórshavnar havn lat pakkhúsið byggja í 1990, hevur Skipafelagið Føroyar leigað húsið. Skipafelagið eigur ein part av húsinum, sum teir hava umbygt til frystigoymslu.

Í ár hevur Skipafelagið aftur gjørt stórar íløgur í pakkhúsið, fyri at tað kann lúka krøvini til efektivan flutningshátt.

Fyri at tryggja sær, at virðini av íløgunum, sum eru gjørdar í pakkhúsið, ikki eru ogn hjá Tórshavnar havn, ynskir Skipafelagið Føroyar at fáa eina 5 ára optión upp á at keypa bygningin frá Tórshavnar havn.

Pakkhúsið, frádrigið áður gjørdar íløgur av Skipafelagnum , varð í summar virðismett til kr. 9.393.000. Hetta svarðar til at húsini verða avskrivaði yvir 37,4 ár, við kr. 384.923 um árið.

Tann árliga leiguupphæddin til Tórshavnar havn er í løtuni kr. 1.183.264. Í umsóknini um optión, verður ynski sett fram um, at ein partur av leiguni verður frádrigin í keypsupphæddini.

Tilmæli frá havnameistaranum: At geva Skipafelagnum Føroyar optión upp á at keypa pakkhúsini fram til 1. januar 2009. At sølivirðið á húsinum verður lækkað við kr. 384.923 árliga, at rokna frá 1. januar 2004. At árliga leigan í optiónstíðini verður 1 mió., og at Skipafelagið yvirtekur alt viðlíkahald.
At Tórshavnar havn, um neyðugt, eisini kann yvirtaka partin hjá Skipafelagnum fyri íløgukostnaðin frádrigið avskriving svarðandi til 37,41 ár.

**Havnarnevndin 8. desember 2003:** Samtykt at geva Skipafelagnum Føroyar optión upp á at keypa pakkhúsini fram til 1. januar 2009. At søluvirðið á húsinum verður lækkað við kr. 384.923 árliga, at rokna frá 1. januar 2004.

At Tórshavnar havn, um neyðugt, eisini kann yvirtaka partin hjá Skipafelagnum Føroyar fyri íløgukostnaðin frádrigið avskriving svarðandi til 37,41 ár.

**Ískoyti:**
Optiónin at keypa pakkhúsini gongur út 31. desember 2008.

Í skrivi frá P/F Faroe Ship ynskja teir at fáa keypsoptiónina longda við einum ári, fram til 31. desember 2009.

Í grundgevingini frá Faroe Ship verður sagt, at áheitanin er grundað á fíggjarligu umstøðurnar í heiminum sum heild.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at leingja optiónina við einum ári, treytað av góðkenning frá landstýrinum.

**Havnarnevndin 17. november 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 27. november 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í skrivi frá Faroe Ship, dagfest 23. desember 2009, ynskir felagið at gera keypsoptiónna galdandi, og at yvirtaka pakkhúsið pr. 31.desember 2009.
Eisini verður biðið um, at leigusáttmálarnir, sum teir hava um grundøkir undir bygningum, verða longdir frá 1. januar 2010 og 25 ár fram.

Frádrigið lækkingina í søluvirðinum, er kostnaðurin fyri pakkhúsið pr. 31/12-2010, kr. 7.086.462,-.

Faroe Ship eigur:
- tað gráa pakkhúsið á Skansabryggjuni matr. nr.600e. Leigusáttmálin um grundøkið gongur út í 2030
- Høvuðsskrivstovuna á eystaru bryggju. Leigusáttmálin um grundøki gongur út í 2018.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Treytað av góðkenning frá landsstýrinum, verður mælt til at:
- selja pakkhúsið til Faroe Ship fyri kr. 7.086.462,-, og at leiga teimum grundøkið sambært leigusáttmála j.nr. 2009-3287
- at leingja leigumálið fyri pakkhúsið á Skansabryggjuni matr. nr. 600e fram til 2035.

**Havnarnevndin 15. februar 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at senda málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og selja pakkhúsið til Faroe Ship fyri kr. 7.086.462,-, og at leiga teimum grundøkið sambært leigusáttmála j.nr. 2009-3287.

Samtykt at leingja leigumálið fyri pakkhúsið á Skansabryggjuni matr. nr. 600e fram til 2035.

Omanfyrinevnda er treytað av góðkenning frá landsstýrinum, og at kommunan hevur forkeypsrætt, velur Faroe Ship at selja pakkhúsið.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**30/10** **2010-0338**

**Dýping av Tórshavnar havn suður úr Tinganesi.**

Í skrivi til Tórshavnar havn, dagfest 5. apríl 2006, heitir Strandfaraskip Landsins á Tórshavnar havn, um at virka fyri at dýpa økið suður úr Tinganesi. Saman við áheitanini er ein frágreiðing frá skiparunum á Smyrli og Norrønu. Í frágreiðingini frá skiparunum verður víst á, at um tað grunna suður úr Tinganesi verður dýpt, gerðst tað munandi tryggari hjá skipunum at koma inn í havnina, tí tá passa skipini millum Tinganes og molan, uttan at vandi er fyri at tey taka botn.

Tórshavnar havn hevur áður víst á, at havnin hevði verið munandi tryggari, um tað grunna suður úr Tinganesi bleiv dýpt, og kunnu tí taka undir við ynskinum hjá skiparunum

Av tí at økið liggur so nær fornminnunum í Tinganesi, hevur tað verið tætt samskifti við Fornminnisnevndina, um loyvi til at dýpa.

Fyri at tryggja fornminnini í Tinganesi, hevur landsstýriskvinnan í mentamálum avgjørt at friða umliggjandi øki kring Tinganes. Friðingin forðar ikki fyri at tað verður dýpt, men hetta skal gerast í samráð við Fornminnisnevndina.

Dýpingin snýr seg um eitt umleið 3.800 $m^2$ stórt øki, sum er mett at kosta 6 mió.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at seta ætlanina í verk, at fíggja av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2010.

**Havnarnevndin 15. februar 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at gera byggiprogram.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og gera byggiprogram.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**31/10** **<u>2010-0202</u>**

**<u>Vatnpumpustøð til íbúðarøkið hjá V. Dalsgarð undir Kongavarða</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sum kunnugt liggur nevnda íbúðarøkið sera ovarliga í mun til vatnbrunnin í Havnardali og vatngoymsluna sunnan fyri Hamaran á Argjum.

Skal trygd veitast fyri nøktandi vatntrýsti undir øllum umstøðum, er neyðugt við eini pumpustøð.

Pumpustøðin verður sett inn í hitamiðstøðina, sum er á staðnum.

Kostnaðurin er mettur til kr. 85.000 fyri ta teknisku útgerðina við uppseting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri vatnverkið mæla til, at játtaðar verða kr. 85.000 til nevndu pumpustøð, og at fíggingin verður tikin av teimum kr. 650.000 sum eru avsettar til íløgur innan vatnveiting 2010.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 85.000 av undirkonto 6775, íløgur í vatnveitingar.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**32/10** <u>**2010-0158**</u>

<u>**Nýtt vatnreinsiverk í Kirkjubø**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vatnkanningar, tiknar fyrst í desember mánaða 2009, staðfesta at drekkivatnið í Kirkjubø ikki er so gott sum áður hildið.
Eldri kanningar hava víst góð úrslit, og kirkjubømenn hava eisini nevnt hvussu gott og vælsmakkandi vatnið er.

Henda staðfesting um vánaligt drekkivatn í Kirkjubø hevur ta fylgju, at reinsiverk má fáast til vega skjótast møguligt.

Byggiloyvi og leiga av lendi er fingið til vega, eisini er kostnaðarmeting uppá grevstur og liðugt reinsiverk fingin frá ávíkavist Sp/f Maskinkoyring og P/F Nomatek. (Sí mál nr. 2008-1006/1-4.)

Flestu av okkara smærru vatnverkum eru frá P/F Nomatek, og borgar tað fyri dygd og góðari tænastu.

<u>Fíggjarlig viðurskiftir.</u>
Grevstur og fundament til reinsiverk er mett til kr. 42.240 og sjálvt reinsiverkið er mett til kr. 128.000.
Samlaði kostnaðurin er mettur til kr. 225.000.

**Tilmæli:**

Tekniski stjóri, býarverkfrøðingur og leiðarin fyri vatnverkinum mæla til at farið verður undir arbeiðið skjótast gjørligt, og at játtaðar verða kr. 169.000 av teimum kr. 650.000, sum eru avsettar til vatnverksíløgur 2010, og restin kr. 56.000 verða fíggjaðar av avlopi á konto 90-14902 (2009) Vatnverk á Velbastað.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 169.000 av teimum kr. 650.000, sum eru avsettar til vatnverksíløgur 2010, og restin kr. 56.000 verða fíggjaðar av avlopi á konto 90-14902 (2009) Vatnverk á Velbastað.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**33/10** **<u>2007-1719</u>**

**<u>Serstøk byggisamtykt fyri ”Útstykking 200” eystan fyri Karlamagnusarbreyt.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
”Útstykking 200”, eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla, er uml. 22.000 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í einum A3 øki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til bústaðir.

63 grundøki, ið eru 200 fermetrar til støddar. Samlaða grundøkið er 300 fermetrar fyri hvørt, har uml. 100 fermetrar verða lagdir til fríøki, sokallað Tún. Túnini eru 3 í tali, og liggja hesi við atgongd frá Karlamagnusarbreyt.

Atgongd verður til alla útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum eru 3 atkomur. Framvið útstykkingini á atkomusíðuni móti Karlamagnusarbreyt, verður ein býlingsvegur, ið kann nýtast, um tørvur skuldi verið á tí. Hetta kann t.d. verða galdandi um ein av atkomuvegunum er ringur at koyra eftir í t.d. hálku ella av aðrari orsøk.

Atkomuvegurin leiðir bilar og fólk inn til Túnini, ið verða savnandi fyri býlingin. Frá Túnunum verða minni húsavegir inn til tey einstøku húsini. Øll felagsparkering, renovatión, møguliga postskipan, bilavask o.a. og spæl verður miðsavnað um Túnini.

Til hvørt Túnið hoyra uml. 20 hús. Húsini standa á einum grundøki, ið eru uml. 200 fermetrar til støddar. Húsini eru 8,75 x 6,25 metrar til støddar, úthúsini/bilhúsini eru 5,50 x 3,75 metrar til støddar. Planering og sokklar til húsini og

úthúsini/bilhúsini verða staðsettir av TK.

Staðsetingin av húsum og úthúsum/bilhúsum verður samtykt í eini serstakari byggisamtykt fyri ”Útstykkingina 200”, eystan fyri Karlamagnusarbreyt

Nú er eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri ”Útstykking 200” gjørt.

Serstaka byggisamtyktin ásetur treytir fyri bygging v.m. og nágreinar ymisk viðurskifti í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um serstaka byggisamtykt fyri ”Útstykking 200” verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Nú avgerð er tikin um at fara í gongd við útstykkingina við Mylnutjørn, hevur umsitingin gjørt uppskot til at tillaga ætlanina soleiðis, at tað slepst undan at byggja brandmúrar ímóti grannamarki. Eisini er uppskot gjørt til at geva loyvi til at byggja karnappar, svalar o.a. eftir at fyrispurningar um hettar eru komin frá teimum sum hava fingið tillutað stykkir.

Tí hevur umsitingin gjørt uppskot um broytingar í serstøku byggisamtyktini hesum viðvíkjandi.

Tær flestu broytingarnar eru í § 4 um bygging, stødd, staðseting og snið húsanna.

Serstaka byggisamtyktin verður løgd fram á fundinum og uppskot til broytingarnar verða gjøgnumgingnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um broyting av serstøku byggisamtykt fyri ”Útstykking við Mylnutjørn”, j.nr. 2007-1719/12, verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt við tí ískoyti, at heiti skal broytast til “Útstykking við Myllutjørn”.

**34/10** **2009-0620**

**Framleingjan av busssáttmálum við MB-Bussar og Sp/f Gundurs Bussar fram til 1. juli 2010**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Busssáttmálarnir, sum Tórshavnar kommuna hevur við MB-Bussar og Sp/f Gundurs Bussar, ganga út 1. februar 2010, og sáttmálin, sum kommunan hevur við fa. Bussferðir, gongur út tann 1. juli. 2010.

Ì sambandi við at bussleiðin skal útbjóðast av nýggjum, verður heitt á teknisku nevnd um at núverandi sáttmálar, við MB-Bussar og Sp/f Gundurs Bussar, verða framlongdir til 1. juli. 2010, so at allir sáttmálarnir halda uppat samstundis. Ætlanin er, at allar bussleiðirnar, sum eru í Tórshavnar kommunu, skulu útbjóðast samstundis. Roknast kann eisini við, at tað skuldi givið eina effikitivisering av bussleiðini, um alt verður bjóðað út í einum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at framleingja teir sáttmálar, sum eru við ávíkavist við MB-Bussar og Sp/f Gundurs Bussar fram til 1. juli 2010.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Nendin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. mars 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ìskoyti:**
Víst verður til tíðarætlanina, um útbjóðingina av bussleiðini 2010 j. nr. 2009-0110/40.

Vísandi til tíðarætlan j.nr. 2009-0110/40 fyri útbjóðingina av bussleiðini í 2010, og at kommunan er vitandi um, at tað tekur millum 6 til 8 mánaðir at keypa bussarnar heim til Føroya, mælir umsiting til at sáttmálarnir eisini við ávíkavist MB-Bussar, Gundursbussar og Bussferðir framleingjast til 31. desember 2010.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeilini mæla til at framleingja sáttmálarnar, sum eru við ávíkavist við MB-Bussar, Sp/f Gundurs Bussar og Bussferðir við Hildur Jensdóttir fram til 31. desember 2010.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd 14. januar 2010.

**Býráðið 28. januar 2010:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti, við tí broyting, at sáttmálin er galdandi til 1. oktober 2010.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti.**
Umsitingin hevur mett um tíðarætlanina og staðfestir, at út frá fyriliggjandi fortreytum ber ikki til at seta nýggju koyringina í verk til tann 1. oktober 2010.

Vist verður til tilmælið til fundin í teknisku nevnd tann 14. januar 2010 um at leingja verandi sáttmálar til 31. desember 2010.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt at leingja sáttmálarnar til 31. desember 2010.

# Mál uttan fyri skrá

**35/10** **2006-0036**

**Stuðul til umhvørvistiltøk**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Fyri at menna vitan/tiltøk innan umhvørvið í Tórshavnar kommunu, verður skotið upp, at heilsu- og umhvørvisnevndin kann veita stuðul til umhvørvisverkætlanir, sum eru til gagns fyri umhvørvið í Tórshavnar kommunu. Hetta kundi t.d. verið agenda 21 verkætlanir, herundir grønar skúlar v.m. Stuðul kann verða givin til stovnar, virkir, feløg og einstaklingar.

Í hesum sambandi skal støða verða tikin til:
- Hvussu tiltakið skal fíggjast
- Hvussu stór upphædd skal játtast pr. ár
- Endamál við játtanini
- Stuðulstreytir

Neyðugt er, at ein reglugerð ella vegleiðing verður gjørd fyri veitan av stuðli til umhvørvisverndartiltøk, sí hjáløgdu reglugerð frá Innlendismálaráðnum.

Nevnast kann, at Keypmannahavnar kommuna m.a. hevur eina agenda 21 pulju, sum veitir stuðul til verkætlanir, sum m. a. kunnar og rágevir brúkaran um umhvørvisvinarlig innkeyp og um umhvørvið, stuðlar umhvørvisbløðum, kunnandi heimasíðum, fyrilestrum og kampagnum um umhvørvið, útbúgving av ráðgevum innan burturkast v.m.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskotinum og at eitt uppskot til eina vegleiðing verður gjørd.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. januar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum um at gera eina reglugerð at leggja fyri nevndina aftur.

Nevndin samtykti eisini, at kommunan søkir Innlendismálaráðið um stuðul sambært § 2 í galdandi reglugerð fyri stuðul av játtanini til umhvørvis- og náttúruverndartiltøk til umhvørvisvikuna 2006.

**Ískoyti:**

Uppskot til reglugerð er hjálagt, sí j.nr. 2006-0036. Umframt hetta skal støða verða tikin til, hvussu tiltakið skal fíggjast, og hvussu stór upphædd verður sett av pr. ár.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskotinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, og at ynski er um, at í § 2, stk. 4, kann undantaksloyvi verða givið í serligum førum.

Nevndin mælir eisini til, at kr. 250.000,00 verða settar av í fíggjarætlanini 2007.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt taka málið upp aftur í.s.v. fíggjarætlanina fyri 2007.

**Ískoyti:**
Skotið verður upp, at ein bólkur verður settur at viðgera umsóknir, sum koma inn. Uppskot til umboð í bólkinum: formaðurin í heilsu- og umhvørvisnevndini og 2 umboð frá heilsu- og umhvørvisdeildini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við omanfyri standandi uppskoti.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. januar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti:**
Víst verður til reglugerð um stuðul til heilsu- og umhvørvistiltøk §3 stk. 1, har umsóknir um stuðul skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári.

Skotið verður upp at broyta freistina í reglugerðini til 1. apríl í hvørjum stuðulsári. Hetta er tí at ynski er um, at kunngjørt verður í umhvørvisvikuni hvørjar verkætlanir stuðul verður veittur til.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Reglugerðin hevur nú verið roynd í 2 ár og vísir royndin, at tørvur er á eini endurskoðan av reglugerðini. Broytingar/tillagingar eru gjørdar til reglugerðina, sí hjálagda notat j.nr. 2006-0036/12.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til, at tikið verður undir við broytta uppskotinum, og at beina málið í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum, tó ynskir nevndin at umsitingin endurskoðar § 2, stk. 4, at leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 29. desember 2008**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Umsitingin hevur endurskoðað §2 stk. 4 í reglugerðini, sí notat j.nr. 2006-0036/15.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við uppskotinum og at beina málið í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 6. januar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. januar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Umsitingin hevur endurskoaðað reglugerðina. Greitt verður frá málinum.

**Tilmæli:** (lagt fram á fundinum)
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at tikið verður undir við endurskoðaðu reglugerðini, j. nr. 2006-0036/22.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 18:55**

| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**25. februar 2010** | Blað nr.:<br>**8422**<br>Formansins merki: |

## GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |